## Vrakgóðs um skrúvuna

Fleiri skip, sum sigla ígjøgnum Fehmern-sundið í Eystrasalti, hava fingið trupulleikar av góðsi, sum stavar frá farmaskipinum Omer N, sum holvdist har í vetur, og sum flýtur enn. Eitt nú hava trý skip fingið stórar sekkir við kunsttøðum um skrúvuna. Omer N var á veg úr Póllandi til Fraklands við kunsttøðum, tá tað legði seg og holvdist í Fehmern-sundinum. Seinni bleiv tað 73 metrar langa skipið togað inn á grunt vatn, har tað nú liggur.



*Turkiska farmaskipið flýtur enn við kjølinum uppeftir*

*Mynd: DR*

## Norðmenn enn ríkari

Norðmenn finna framvegis nýggjar olju- og gassleiðir á landgrunninum. Nú hava teir funmnið eina stóra gassleið ímillum tvær aðrar gassleiðir undir havbotninum vestur úr Sognefjørðinum. Einki verður sagt um, hvussu stór leiðin er ella kann vera, men Dagens Næringsliv sigur seg hava skilt, at tann nýggja leiðin er fleiri ferðir størri enn leiðin Marulk, sum varð funnin herfyri. Hon er mett at vera tann fimtistørsta, sum er funnin á landgrunninum.

# Óhugnalig líkasæla í

**Skal Føroyar vera eitt land fyri nøkur útvald sterk fólk, spyr Ingvald á Kamarinum, sum ynskir at seta serskúla á stovn í Føroyum, men bara møtir tøgn frá Mentamálaráðnum. Hann undrast eisini um, at Lærarafelagið og Pedagogfelagið finna seg í vanlukkuligu støðuni hjá veikum næmingum í føroyska fólkaskúlanum**

BØRN OG UNG
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*- Tað er ikki lekidómur at senda børn og ung til eitt heilt annað land. Hetta er ein síðsti útvegur hjá kroystum foreldrum og ein flýggjan undan ábyrgd hjá politisku- og fyrisitingarligu umsitiningi, staðfestir Ingvald á Kamarinum, skúlastjóri á donskum serskúla*

Ingvald á Kamarinum søkti fyri tveimum árum síðani um samstarv við Mentamálaráðið, so at hann kundi seta á stovn ein skúla í Føroyum, sum líkist Fjordskolen, har hann sjálvur er leiðari. Men Mentamálaráðið hevur ikki ønt honum aftur.

- Tað er undarligt, at man als einki svar fær. Eg havi samskift við fleiri donsk ministerier, og tað tekur teimum ongantíð longur enn tríggjar vikur at svara.

Men frá Mentamálaráðnum fær mann púrt einki svar, sigur Ingvald av Kamarinum.

Hann sigur, at hann næstan hevur vænt seg við líkasæluna hjá umsitingini, men hann undrast yvir, at Pedagogfelagið og Lærarafelagið ikki eru meira harðrend.

- Hvar er fakligi stoltleikin hjá hesum feløgum, tá ið tey bara lata sær linda, at einki hendir, spyr Ingvald á Kamarinum.

Hugsjónin aftanfyri skúlan hjá Ingvald av Kamarinum er fyrst og fremst at taka útgangsstøði í tí einkulta næminginum. Á Skúlanum ganga umleið 20 børn millum seks og 15 ár, og tey hava øll trupulleikar, sum ger fólkaskúlan ógegnaðan fyri tey.

- Vit hava børn við diagnosum sum ADHD og Torette, men vit hava eisini fleiri børn við óstaðfestum veikleikum og børn sum hava havt so veika sosiala bakgrund, at tey hava fingið kensluligt órógv.

Skúlin tekur næmingar heilt niður til seks ár, tí – sigur Ingvald - pedagogar duga væl at siggja, um eitt barn fær skúlatrupulleikar ella ikki, og jú skjótari tað fær hjálp jú betri.

- Tí undrar tað meg stórliga, at føroyskir pedagogar og lærarar, sum siggja trupulleikarnar í gerandisdegnum ikki rópa harðari, sigur Ingvald á Kamarinum.

### Støðan er hættislig

Ingvald er skelkaður, um at foreldur kenna seg so kroyst í Føroyum, at tey velja at senda børn síni til Danmarkar.

- Í dag eru bókligu krøvini so stór, at fleiri børn detta niður ímillum. Men í Føroyum heldur mann fast í, at øll børn skulu passa til eina bókliga skúlagongd við 24 børnum í hvørjari stovu, sigur Ingvald á Kamarinum

- Men eg má viðganga, at eg ongantíð hevði sent børn míni til eitt annað land. Í Fjordskolen leggja vit stóran dent á at samstarva tætt við foreldrini, og øll børnini búgva heima ella hjá pleygufamiljum. Einki kann koma í staðin fyri foreldrakærleikan, og um eitt barn verður

## Fyrimynd hjá enskum serlærarum

Serskúlin hjá Ingvald á Kamarinum fekk í heyst vitjan av 10 enskum serlærarum, og teir vóru allir hugtiknir av skúlanum. Tað var Dansk Kulturinstitut sum saman við British Council skipaði fyri ferðini, og tey høvdu valt Fjordskolen út sum ein serliga góðan serskúla. Nakrir av ensku lærarunum vóru so hugtiknir, at teir spurdu um Ingvald ikki eisini kundi seta ein slíkan skúla á stovn í Englandi, tí so høvdu teir søkt um starv har. Ingvald á Kamarinum fegnaðist, sum hann sigur í grein her á síðuni, um heiðurin.

## Hvat kostar tað?

Í Fjordskolen ganga 20 næmingar, og átta fólk eru knýtt at stovninum. Hvør næmingur kostar umleið 300.000 túsund um árið. Hetta er bara ein dagskúli, og um talan er um ein kostskúla, har børnini eisini búgva, liggur kostnaðurin um tær 600.000 krónurnar, metir Ingvald á Kamarinum. Mentamálaráðið segði í Oktober, at tey væntaðu at okkurt tilboð kom hetta skúlaárið kom til børn við menningarórógvi hetta skúlaárið, tí 500.000 krónur vóru settar av til hetta. Hvussu nógv børn eru send til danskar serskúlar hevur Sosialurin ikki eina samlaða mynd av.